## Kvøldið hilnaðist væl hjá Danmark

Danir kundu ikki ynskt sær eitt betri fótbóltskvøld leygardagin. Danska landsliðið tók ímóti Malta í Parkini, og vunnu danir ein tryggan 3-0 á maltesunum, sum ikki gjørdu tær stóru skreytirnar. Søren Larsen kom aftur á slóðina, sum málskjútti á danska landsliðnum, og longu eftir 10 minuttum hevði hann givið Danmark leiðsluna. Daniel Agger økti við einum brotsparksmálið, tá ein hálvur tími var farin av dystinum. 2. hálvleikur var ikki nógv meira enn byrjaður, so hevði Søren Larsen økt til 3-0, sum gjørdist endaliga úrslitið. Samstundis spældu Svøríki og Portugal javnleik 0-0 á Råsunda Leikvøllinum í Stockholm. Ungarn vann 2-0 á Albania í Budapest Mikukvøldið tekur Malta ímóti Ungarn, og Portugal tekur ímóti Albania. Danmark og Svøríki spæla ikki undankappingardyst, fyrr enn komandi vár.



## Nú stendur á jøvnum

Hvørki sum spælari ella hjálparvenjari hevur Jens Martin Knudsen tapt móti Eysturríki á heimavølli, og tí var smílið sjálvandi stórt, tá dysturin leygardagin var av. – Á heimavølli hava vit so heilt víst fatur á teimum. Hinvegin hava teir vunnið okkum á útivølli, so fyribils kanst tú siga, at tað stendur á jøvnum við einum sigri, einum tapi og einum javnleiki. Men hetta vísir fyrst og fremst, at arbeiðir tú hart og miðvíst, so kanst tú eisini røkka tínum málum, segði Jens Martin Knudsen.

### Føroyar-Eysturríki 1-1 (0-0):

# Christian var kongur ín



*Á myndini eru tríggir eysturríkarar um Christian Lamhauge Holst, men tað tykist ikki nervað álopsessið, sum í serflokki var besti maðurin á vøllinum leygardagin*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Spádómurin hjá fráfarandi venjaranum um at nýggja landsliðið er búgvið til góð avrik, varð staðfest við Lamhauge-manninum í lyklaleiklutum saman við Jákupi Mikkelsen og Atla Danielsen**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað er ikki á hvørjum degi ella rættari á hvørjum ári, at Føroyar vinna stig í kappingardysti í fótbólti. Tí skal tónin beinanvegin verða sligin positivt ann. 9. oktober 2004 endaði tað 2-2 á Kypros. Síðani tá eru nógvir landsdystir spældir, venjarin er skiftur út, og ikki fyrrenn 11. oktober 2008 ella fýra ár seinni eydnaðist tað aftur at vinna stig.

1-1 ímóti Eysturríki kveikir góð minni, og úrslitið ber við sær, at Alpulandið eisini næstu árini fer at vera dreyma mótstøðuliðið hjá føroyingum, og at Føroyar fara at vera marran hjá eysturríkarum.

Um heilt væl hevði vitað við, so kundi tað kanska havt enda við sigri. Bogi Løkin skoraði føroyska málið tveir minuttir eftir steðgin. Sum so ofta leygardagin vóru nógvir føroyskir spælarar á eysturríksku hálvuni, tá ið Christian Høgni Jacobsen úr eitt sindur í høgru stakk bóltin mitt fram í brotsteigin. 19 ára gamli NSÍ maðurin var ísakaldur, tá ið hann setti bóltin flatt framvið Juventus málverjanum, og so tevjaðu vit endurtøku av 18 ára gomlu Landskrona sensatiónini.

Men ólukkutíð svaraði mótstøðuliðið aftur bara knappar tveir minuttir seinni. Jákup stýrdi meistarliga frísparksroynd út av vøllinum til horna. Verjuskipanin undir málinum var góð, men hon varð skeiklað, tá ið Arnbjørn Hansen frammanfyri fremra stólpan við høvdinum snittaði bóltin, sum verjuspælarin Martin Stranzl úr stuttari fjarstøðu smekkaði í málið.

Tveir minuttir í barrónasongini, og so kundi tað sæð út til, at tað kanska fór at ganga, sum tað so mangan hevur gjørt.

### Vístu format

Men tá var tað, at føroyska liðið vísti sítt format. Avríkið var staðfesting av, at landsliðsvenjarin hevði rætt, tá ið hann í síni fráboðan um, at hann fór at leggja frá sær, í sama andadrátti legði afturat, at hann roknar føroyingar nú at eiga landslið, sum kann røkka størri avrikum og úrslitum.

Venjarin vísti í útgangsstøðuni dirvi: Fróði Benjaminsen, sum í fleiri ár hevur átt fastan sess, áðrenn hann fyrr í ár varð skaddur, noyddist at taka til takka við bonkarkjansi og varð settur á vøllin, tá ið Mikkjal Thomassen noyddist at taka seg aftur.

Venjarin vísti flestu teirra, sum høvdu rokkið góð úrslit í Serbia og á heimavølli ímóti Rumenia, álit, og teir fingu enn eina ferð høvi at vísa, hvør dugur var í teimum. Teir tóku av, hóast Jóhan Troest Davidsen hevði verið sjúkur dagarnar frammanundan:

Avrikið leygardagin og